Filmsvika



*Bergur Johannesen ummælir*

# Ísakalt drama

**Eitt net av lygnum, sviki og kærleika verður spunnið í hesum finska dramafilminum. Ondin verður hildin líka til endans, tá øll eru offur í hesum vandamikla spæli**

**»BLACK ICE«**

★★★★★☆



Alt er líkt einum dansi á rósum í byrjanini. Saara og Leo eru eitt vælhavandi, miðaldrandi par, men beinavegin finnur Saara útav, at maður hennara er ótrúgvur móti henni. Fyri at koma til botns í hesum, finnur hon útav, hvør elskarinnan er. Hon letur seg blíva vinkonu hennara, men ikki undir hennara veruliga navni. Dupult lív hennara tykist at rigga væl, men vandi er fyri, at hon gongur á tunnum ísi.

Trupulleikin verður heilt frá byrjan settur klárt fram, men veksur gjøgnum allan filmin. Netið av lygnum og sviki dregur fleiri og fleiri inn í leikin. Eini gerningurin leiðir til hin næsta, og hyggjarin situr á eggini á setrinum, bíðar til bumban brestur. Lítli kavabólturin fer á rull, men so við og við sum hann veksur verða øll drigin upp í og hugtikin av hesum leiki. Ongantíð kemur kenslan fram av at vera eitt stig framman fyri høvuðspersónin.

Persónarnir eru hugtakandi á allan hátt. Sterkar persónligheitir og væl spældir leiklutir. Trygga og úthugsaða Saara heldur hyggjarunum í einum jarntaki, tá tað rennur kalt oman eftir rygginum, og hon hyggur við ísakøldu eygunum.

Trupulleikarnir eru veruligir, men tó so álvarsamir og vaksandi at talan er um eitt serdømi.

Søgan er uttan iva sterkasta síðan í hesum filmi. Væl skrivaður, sjálvdan ber til at síggja slíkar filmar, ið eru so væl uppbygdir og gjøgnumhugsaðir.

Men hóast spenningurin veksur, so tykist hann at vera í longra lagi. Endin kundi verið longri og fyrr. Samanumtikið eitt serdømi um drama í heimsflokki, frálík dyrkan av menniskjuni og hennara sinnalagi.

---



# Keðiligu bamsurnar

**Thomas Winding hevur skapt eina keðiliga, óhugnaliga, ótíðarhóskandi søgu um tær tríggjar bamsurnar. Einki klimaks ella nakað sum helst spennandi hendir, sjálvt børnini í salinum byrjaðu at keða seg áðrenn hann var komin í helvt**

**»LILLE BAMSE«**

☆☆☆☆☆☆

Hóast rørslurnar vóru animeraðar, sást at ætlanin var at skapa ein teknifilm, sum teir vóru í teimum gomlu døgunum. Bamsurnar fluttu seg, sum nútímans tøknin loyvir teimum, men litirnir sóu gamlir út. Tær vóru svartar, men alla tíðina broyttist liturin, sum um alt var teknað. Somuleiðis eisini liturin á reyðu nasunum fór frá ljósareyðum til reytt til næstan appilsin gult. Hetta fekk tað at tykjast, sum um hann var gamal, men samstundis órógvaði óneyðugt á ein óhugnaligan hátt.

Tær tríggjar bamsurnar, ið vit flygja gera ymiskt hendan dagin. Til dømis missa tær húslykilin burtur og royna at finna hann aftur. Hóast hetta er ein upplagdur møguleiki at fáa børnini við í søguna, var hann ikki nýttur. Bamsurnar leita í sínum keðiliga seina tempo, og knappliga finnur lítla bamsan lykilin, og søgan fer víðari. Hvør hending tekur langa tíð og einki leggur upp til nakran sum helst spenning.

Dagurin hjá bamsunum fevnir um tríggjar hendingar, men hvør er keðiligari og hendingaleysari enn hin fyrra. Á ongan hátt er filmurin tíðarhóskandi. Barnafilmarnir, ið vit kenna frá hesari øldini fáa børnini við og nýta persónar, hendingar og litir, ið børnini elska. Her verður einki av hesum nýtt. Stutt eftir byrjan fóru børnini at keða seg, og alt gjørdist meira spennandi, enn stóri skíggin í salinum.